# Jupiter siglir til Skagen

Jupiter fór gjáranáttina, at sigla til Skagen, teir hava 750 tons av sild. Væntandi verða teir í Skagen tíðliga í morginári. Á seinasta túrinum landaðu teir 587 tons av makreli í Fosnavåg í Norra, teir fóru úr Fosnavåg 25. januar.



# Bumbaðu sjúkrahús

Fleiri granatir raktu í nátt eitt sjúkrahús í Sri Lanka. Almennar keldur siga, at álopið á sjúkrahúsið kostaði minst seks mannalív, og at 15 fólk vórðu særd. Sjúkrahúsið, sum eitur Puthukkudiyiruppu, er í landnyrðingspartinum av Sri Lanka, har harðir bardagar hava verið millum stjórnarherin og Tamilsku Tikararnar. Ein talsmaður hjá stjórnarherinum sigur við BBC, at tað var stjórnarherurin, sum bumbaði sjúkrahúsið. Tamilsku Tikararnir vilja heldur ikki átaka sær ábyrgdina av álopinum. ST sigur, at 500 sjúklingar vóru á sjúkrahúsinum, tá tað bleiv álopið.

*Aftast frá vinstru: Selma Ellingsgaard, finalistur, Hilmar Jan Hansen, dómari, Gunnar Nolsøe, vertur, og Hans Trygvi Terin, finalistur Fremst frá vinstru: James Olsen og Eyðfinn Drewsen, vinnarar*

*Mynd: Jan Müller*



## Quizturin í tølum

32 luttakarar
343 spurningar
22 musikalskar avbjóðingar
516 stig latin
17,2 stig í miðal til hvørt liðið

Kelda: Hilmar Jan Hansen

# Morgunvertir vunnu á fakfelagsforkvinnu við sakførara

**Eyðfinn Drewsen og James Olsen vistu so gott sum alt, tá finalan á Quiztinum, sum Gunnar Nolsøe og Hilmar Jan Hansen hava skipað fyri, var í Atlantis leygarkvøldið**

SPURNARKAPPING

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

– Eitt lítið sindur yngri enn vit. Gittarleikari, sangskrivari, sangari og føddur í Havn. Er tað ikki Jens Marni, soleiðis megnaðu morgunfrísku vertirnir á morgunroðanum at gita ein tónleikara uttan nakra upplýsing yvirhøvur. At James Olsen hevur spælt tónleik saman við Jens Marna, og Eyðfinn Drewsen er granni hjá honum hevur onki at siga, tí hesin spurningurin segði veruliga nakað um vitanina hjá dreingjunum í rásarúminum, sum eisini megnaðu at gita, at tað var Jón Tyril, ið tosaði um seyðasparlar, ið vóru ballaðir inn í tara.

Als ikki tað, Hans Trygvi Teirin, sakførari, og Selma Ellingsgaard, forkvinna í starvsmannafelagnum, vistu eisini væl. Hóast Selma Ellingsgaard megnaði at fáa ljósu røddina hjá Filipi Mortensen at vera Guðrið Hansdóttir. Hetta hevur hon biðið orsaka fyri.

### Skipaspurningurin

Jonhard Hammer, stjóri á Rás2, segði í einum innslagi, at einasti skipaspurningurin, sum James og Eyðfinn kanska fóru at vita, var um svarið var Norrøna. Norrøna var ikki rætta svarið í skipaspurninginum, men heldur ikki Selma og Hans Trygvi megnaðu at gita, at farmaskipið Líðartindur kom til Føroyar í 1984.

Men spurningurin Selma Ellingsgaard hevði mest ilt av, var ein árstalsspurningur. Hon hevur sjálv gingið á felagsskúlanum á Oyrarbakka, men tá endaliga svarið kom, vóru forkvinnan við advokati eitt heilt ár við síðurnar av. Tað vóru morgunvertirnir eisini.



*Í fyrru helvt av kappingini vóru James Olsen og Eyðfinn Drewsen, morgunvertir á Rás2, á pallinum í Atlantis. Meðan Selma Ellingsgaard, forkvinna í starvsmannafelagnum, og Hans Trygvi Teirin, advokatur, vóru í kjallaranum. Tá alt var liðugt, endaðu morgunvertirnir eisini omaná*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

### Kappingin

Quizturin hevur verið á skránni í allan vetur. Gunnar Nolsøe hevur trúliga staðið fyri, meðan Hilmar Jan Hansen hevur verið dómari. Nógvir tættir dystir hava verið, og ikki minst finalistarnir hava vunnið dystir við eykaspurningum.

Sjálv finalan var í Atlantis í Klaksvík, og áðrenn finalan byrjaði vóru øll sitiplássini bíløgd. Men tað vóru ikki øll, sum møttu, so tey, ið møttu í seinastu løtu sluppu eisini inn í Atlantis, sum var nærum fullsett, tá kappingin byrjaði.

Kappingin var skipað soleiðis, at annað liðið var inni í salinum saman við dómarunum, meðan hitt liðið var niðri í kjallaranum í húsinum og víst á stórskermi, haðani tað eisini tosaði inn í salin.

### Tallismann

Áðrenn kappingin byrjaði hevði James Olsen ikki so góðar vónir til kappingina, men Eyðfinn Drewsen var við gott mót, tá teir høvdu fingið tvær bamsur – lullebul 1 og 2 – frá Jan Müller, stjóra í Miðlahúsinum.

Fyri at taka saman um, kann mann siga, at frísku dreingirnir av Rás2 gjørdu bart í Kringvarpinum.